## Gade fyri níggjundu ferð

Peter Gade vann um vikuskiftið sítt níggjunda DM-heitið í harrasingle í badminton. Í finaluni vann Gade móti 22 ára gamla Jan Ø. Jørgensen, sum eisini hótti veteranin við at finna 21-16 í fyrsta settinum. Eftir hetta tók 33 ára gamli Peter Gade yvir, og við tvær ferðir 21-12 tryggjaði hann sær sítt níggjunda DM-heitið. Eitt tal, sum bert Morten Frost hevur rokkið áður.



## Lippi nevnir ikki Føroyar

Føroyar eru nú aftur komnar í bólk saman við heimsmeistarunum úr Italia, men Marcello Lippi hevur enn ikki nevnt Føroyar við einum orði. Hann hugsar meira um, at tað er ein rættiliga javnur bólkur millum tey fremstu. – Vit hava fingið ein javnan bólk, har bæði Slovenia og Serbia, sum bæði eru við til HM, eru við, sigur Marcello Lippi, italskur landsliðsvenjari, við Gazzetta.it. Hann leggur afturat, at hann heldur tað vera ein fyrimun at vera í einum bólki við seks londum.

# Seks skjúttar í Danmark

**Sunnudagin 7. februar luttóku 6 føroyskir bogaskjúttar í kappingini um Frederiksborg Pokalen í Hillerød, har um 150 skjúttar úr Danmark og Svøríki eisini luttóku**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*



Tað gekk rættiliga væl, tá seks av føroysku bogaskjúttunum um vikuskiftið vóru í Danmark og kappaðust

Í bólkinum recurve luttóku Odd Andreasen og Oddmar Nielsen úr Ørvi. Innleiðandi skutu báðir 548 stig, men var Odd fremri við einum 10'ara fleiri. Fremsti skjúttin hevði 555 stig og næsti hevði 550 stig.

Í fjórðings-finalunum vunnu báðir sínar dystir. Odd vann 110-103 og Oddmar vann 108-107.

Í hálv--finalunum bleiv kappingarðari og skutu teir ímóti teimum báðum, sum innleiðandi vóru framman fyri teir. Odd tapti 110-111, meðan Oddmar megnaði 112-112 og var í umskjóting, har hann tapti 9-10.

Samanum tikið fín úrslit teirra viðkomandi, og Odd fekk eisini eitt bronsumerki fyri ómakin.

Í bólkinum compound menn II luttók Bogi Andreasen, Vágaskot. Hann vann bólkin við 565 stigum og setti persónligt met. Samanlagt tvørtur um allar bólkarnar hjá teimum vaksnu (elitu, I, II og junior) bleiv hann nummar 22 av 38. Bert 16 sluppu víðari til finalurnar. Eisini eitt gott úrslit, sum gav honum eitt gull heiðursmerki fyri at vinna bólk I.

Í bólkinum recurve menn I luttók eggaba Andreasen, Vágaskot. Hann bleiv nummar tvey í bólkinum við 537 stigum, men av tí, at hesin bólkur og junior bólkurin oru smærri, vóru teir slignir saman. Hetta gjørdi, at Eggaba ikki fekk heiðursmerki, men megnaði við úrslitinum tvørtur um allar bólkar at koma til finaluumfarið, har 16 skuldu skjóta. Eggaba var nummar 13 av 44.

Í 1/8-finaluni møtti hann nummar 4 og tapti dystin.

Í bólkinum recurve menn II luttóku Tórfinn Hansen og Tórhallur Simonsen, báðir úr VágaSkoti. Teir vóru ikki so væl nøgdir við sína skjóting og endaðu ávikavist nummar 30 og 34 av 38 við 498 og 479 stigum.

Eingin teirra slapp víðari millum teir 16 til finalurnar.

Schandorff Vang var við sum venjari og liðleiðari.

# Woods aftur hjá konuni

**Sambært Sunday Mirror hevur Tiger Woods fingið seks mánaðir frá konuni til at sannføra um, at hon er tann einasta eina í hansara lívi**




**Jákup Mørk**

Eftir at hava verið í viðgerð fyri ovurstóra sex-tørv tín er Tiger Woods nú til reiðar at flyta heim til konu og børn, samstundis sum hann skal fáa skil á privatlív sítt.

Sambært Sunday Mirror hevur Elin Nordegren nú givið manninum boð um, at hann fær seks mánaðir til at prógva, at tað er hjá henni, at hann vil búgva. Megnar Woods at halda sær í skinninum komandi seks mánaðirnar, sigur konan seg vera til reiðar at seta ringin á fingurin aftur.

Sambært blaðnum eru tað læknarnir á viðgerðarheiminum, Gentle Path, í Mississippi, har Woods hevur verið til viðgerð, ið hava sannført svensku konuna hjá Woods um, at tað ber til at fáa tamarhald á trupulleikum hansara.

Ein vinmaður hjá Tiger Woods sigur við blaðið, at læknarnir hava sannført Elin um, at Tiger Woods veruliga hevur gjørt stór framstig, og at hann hevur menniskjansligu eginleikarnar, sum eru neyðugir, um hann skal broyta atburð.

Í gjár kundi soleiðis staðfestast, at Woods er fluttur inn til konuna. Fyribils í einum húsi í Florida, men ætlandi skulu tey hesa vikuna flyta heim, og har verður fyrsta uppgávan at halda eitt ára føðingardagin hjá yngsta soninum, Charlie.



Tað røkist nú fyri, at Tiger Woods aftur verður at síggja á golfbreytini. Í fyrstu atløgu verður setningurin tó at fáa familjulívið upp á pláss